# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Elsebeth Johannesen, Hoyvík:

## 25 ára starvsdag hjá Tryggingarfelagnum Føroyar



1. september hevði Elsebeth Johannesen í Hoyvík 25 ára starvsdag hjá Tryggingarfelagnum Føroyar

Elsebeth byrjaði sum skrivstovunæmingur hjá Tryggingarsambandinum Føroyar 1. september 1979.

Hon hevur arbeitt í ymiskum deildum í felagnum, tó mest innan biltryggingar og bilskaðar.

Tá hon byrjaði var Marius Thomasen stjóri, og Bjartur Dalsgarð var deildarleiðari á bildeildini.

Í dag arbeiðir Elsebeth á Roknskapardeildina hjá Tryggingarfelagnum Føroyar.

Elsebeth er 43 ára gomul og úr Havn, dóttir Hjørdis, f. Petersen, úr Kollafirði, og Hákun Mortensen í Havn.

Hon er gift við Hans Martin Johannesen, ættaður av Skála, tey eiga fýra børn: Niklas, Hjørdis, Súsanna og Hákun.

### Dagurin

**2. september.** Elisa, profeturin sum kongabøkurnar í Gamla testamenti vita at greiða frá. Í gomlum álmanakkum var navnið skrivað Eliseus, sum kemur av latínska bíbliutýðingini Vulgata. Eliseus hevur verið brúkt sum mansnavn í Føroyum.

Navnið merkir Guð hevur hjálpt, ella Jahve er Guð mín.

TOYOTA COROLLA
T-sport 192 HK



ÁRG. JULI 2002 · KM 31.000 · 6 GEAR
TIL SØLU FYRI 190.000 KR
TEL 514716

Elinborg Johannesen, Tórshavn:

## 45 ára starvsdag hjá Tryggingarfelagnum Føroyar



1. september 2004 vóru liðin 45 ár síðan Elinborg Johannesen í Havn byrjaði sum skrivstovunæmingur hjá Tryggingarsambandinum Føroyar.

Tryggingarsambandið var tá stutt frammanundan flutt frá Tinganesi yvir á Kongabrúnna.

Elinborg arbeiddi í mong ár við bil- og á sjóvátrygging. Nú er hon á vinnudeildini.

Tá hon byrjaði í 1959 vóru einans 9 starvsfólk í felagnum við stjóranum, í dag eru tey langt yvir 100. Alt arbeið varð gjørt manuelt, ongar kopimaskinur vóru. Einans skrivimaskinur og kalkerpappír.

Elinborg hevur arbeitt undir fýra stjórum: Thomas Thomasen, Marius Thomasen, Jens Petur Arge, og núverandi stjóranum Gunnar í Liða.

Elinborg er 62 ár og ættað úr Kvívík, dóttir Binu, f. Nysted, og Jørgin Danielsen úr Kvívík.

Hon er gift við Árna Johannesen, ættaður úr Fuglafirði, tey eiga tveir synir, Jørgin og Kristjan, sum báðir búgva í Havn.

## Frits Johannesen, Toftir, 60 ár



Mikudagin 1. september rundaði kendi toftamaðurin Frits Johannesen, bilførari og grótlaðari, tey seksti.

Frits er sonur Michael og Onnu Kristinu Johannesen úr Tøðuni á Toftum. Frist er giftur við Vilbjørg av Skála, og eiga tey fýra børn - tríggjar synir og eina dóttur.

Sum ungur fór Frits at troyta sjógvin. Hann róði út í Grønlandi í 1960, 1961 og 1962 við bátinum Vaðnum hjá Justinus Hansen á Toftum. Í 1963 og 1966 var hann til fiskiskap við Jógvan Norði við Jógvan I Olsen á Toftum sum skippara. Í 1964 og 1965 róði hann út í Grønlandi við Fiskinum hjá Hanna Højgaard í Króki á Toftum. Seinni hevur Frits eisini av og á verið til skips, men síðan 1967 hevur høvuðsarbeiði hansara verið á landi sum bilførari og grótlaðari.

Ì 1967 keypti Frits sær sín fyrsta lastbil við merkinum Scania frá Rósing Rasmussen í Runavík. Frits hevur gott eyga á Scaniabilunum, og hann hevur bara hildið seg til Scania øll árini. Núverandi bilur, sum er tann fjórði í røðini, er frá 1986. Bilarnir hava altíð verið væl viðfarnir - og týðiliga sæst, at Frits leggur nógv fyri til tess at røkja sín lastbil.

Umframt vanliga lastbilakoyring hevur Frits serliga lagt seg eftir at arbeiða sum grótlaðari. Sigast má, at hann hevur sýnt sera gott hegni til hetta arbeið. Allastaðni, har hann hevur verið, standa garðar hansara sum eitt listarligt prýði fyri eygað, og hann hevur stóra rós uppiborið fyri sítt nærlagni. Mong stórarbeiði eru eisini gjørd hesi árini: við Føroya Banka á Toftum og í Runavík, við kirkjurnar í Fuglafirði, Leirvík og Glyvrum, við minnisvarðan á Toftum og Æðuvík, við nýggja eldrasambýlið Vesturskin á Toftum og mong, mong onnur.

Tað er altíð hugaligt at koma á tal við Frits, sum altíð veit eina góða søgu - gamla ella nýggja. Við sínum lætta lyndi setur Frits altíð dám á, har hann er staddur.

Við hesum fáu orðum fari eg at ynskja tær, skyldmanninum, hjartaliga tillukku við teimum seksti árunum við bestu ynskjum og Guðs signing.

**Súni í Hjøllum**

## Kirstin Andreassen 80 ár



Í dag, hósdagin 2. september, verður Kirstin Andreassen í Havn 80 ár. Kirstin er havnarfólk. Her varð hon fødd, og her hevur hon búð so at siga alla sína tíð.

Foreldrini vóru Jóhanna og Jens Christian Guttesen. Hon var úr Skálavík, og hann var havnarmaður. Jens Christiani verður framvegis minstur fyri síni serligu evni at fáast við tónleik. Tey bæði fingu trettan børn. Av teimum komu ellivu undan, og við nútíðar eygum tykist tað heilt ófatuligt, at tað bar teimum til at búleikast í lítlu húsunum við Tinghúsvegin, har tað eisini ofta vóru gestir.

Tey ellivu systkini vóru: Jens, Maja, Óli Jógvan, Gunhild, Kirstin, Petur, Leivur, Brynhild, Erling, Ingrid og Gunnar. Jens, Óli Jógvan, Gunhild og Leivur eru farin. Hini búgva øll í Havnini uttan Erling, sum býr í Keypmannahavn.

Eftir at hon var liðug í skúlanum, arbeiddi Kirstin í bakarínum hjá Frants, hjá Hans Joensen og í Sápuhúsinum. Áðrenn hon giftist var hon eitt skifti í Keypmannahavn og tænti, og fyrst í seksti árunum arbeiddi hon í Radio El, sum William Sloan átti.

22. august í 1949 giftist Kirstin við Leivuri Andreassen ella Leivuri í Ullvøruhúsinum í Havnini. Fýra ár eftir, at tey bæði vóru gift, fluttu tey til Keypmannahavnar, sum Leivur sigldi út frá. Tey búðu niðri í trý ár. So fluttu tey aftur til Havnar. Fyrst búðu tey í raðhúsi í Jóannesar Paturssonargøtu, síðani fluttu tey í Ullvøruhúsið, har tey búðu í mong ár, og seinastu stóru fjórðings øldina hava tey búð uppi við Plantaguna - í Jústsgøtu.

Kirstin og Leivur eiga tvey børn - Maria og Jens, sum bæði búgva í Havnini og arbeiða á Landssjúkrahúsinum. Hon er sjúkrasystir, og hann er lækni. Barnabørnini eru átta, og Kirstin eigur tvey langommubørn.

Kirstin var í Ebenezerkórinum, frá tí hon var blaðung og inntil fyri einum tíggju árum síðani. Hon hevur góða og berandi rødd, og tað finnast fleiri upptøkur, eitt nú hjá Evangelisku Røddini, har Kirstin eigur solorøddina.

Kirstin hevur altíð verið stak fyrikomandi og smílandi. Hon hevur altíð havt gávurnar at seta kulør á, har hon hevur verið. Hon er framúr gestablíð, og hennara næstu bera henni, at tey høvdu ikki kunnað ímyndað sær eina betri ommu.

Føðingardagin er opið hús frá klokkan 10 og inntil klokkan 14 hjá Ebbu og Jensi í Javnagøtu.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

90 ár síðan Petur W. Háberg varð føddur:

## Kvøldseta við bóka- og fløguútgávu

**Í sambandi 90 ár eru liðin síðan røðarin, skaldið og rithøvundurin Petur W. Háberg varð føddur, var skipað fyri almennari kvøldsetu í Ebenezer týskvøldið 31. august**



*Zacharias Zachariasen frá forlagnum Leirkerið í Gøtu, og Dánjal Poulsen frá Evangelisku Røddini, handaðu Hjørdis Háberg fyrstu eintøkini av ávikavist bókini og fløguni*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Rættuliga nógv fólk vóru savnaði í Ebenezer í Havn týskvøldið í samband við at 90 ár vóru liðin síðan røðarin, skaldið og rithøvundurin Petur William Háberg varð føddur.

Hann varð føddur í Havn 31. august 1914 og doyði 70 ára gamal 25. oktober 1984.

Svenning av Lofti leiddi kvøldið, og hann segði frá ymiskum áhugaverdum um Petur Háberg.

Dánjal Poulsen frá Evangelisku Røddini segði nøkur orð í sambandi við nýggju fløguna, sum ber heitið „Kom, sæla stund", har 19 sangir eru á, sum Petur Háberg hevði yrkt og týtt.

Zacharias Zachariasen frá forlagnum Leikerið í Gøtu, sum hevur givið bøkurnar hjá Peturi Háberg, Søgur um Sangir 1 og 2, út av nýggjum, segði eisini nøkur orð í hesum sambandi.

Bæði Dánjal Poulsen og Zacharias Zachariasen, sum kendu Petur Háberg sera væl, hugleiddu eisini um hann.

Síðan handaðu teir fyrstu eintøkini av bókini og fløguni til Hjørdis Háberg, konu Petur Háberg, sum var við til kvøldsetuna.

Umframt sangkórið í Ebenezer sang eisini kórið í Frelsunarherinum og Finnur Hansen sang saman við dóttrini Miriam, og Victor Carlsen sat við flyglið. Eisini luttóku Dupultkvartettin, Brita á Váli Smith, og Elin og Ingun, sum eru abbadøtur hjá Peturi Háberg.

Seinasti talari var Páll á Lakjuni í Fuglafirði, greiddi sera livandi frá tíðini, tá hann sum ungur kom til Havnar og bleiv ein partur av undómsarbeiðinum í Bíbliuklassanum hjá Peturi Háberg.



*Finnur Hansen saman við dóttrini Miriam sungu sangin "Eg sum ein ferðamaður"*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Hjørdirs Háberg saman við børnunum f.v.: Pætur, Elma, Beinta Erna, Malan og Jógvan Páll*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Kórið í Frelsunarherinum saman við Ebenezerkórinum*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Kórið í Frelsunarherinum sang sangin "Halleluja syngur í mínum hjarta" hjá Peturi Háberg*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*Fleiri í familjuni hjá Peturi Háberg, fremra rað, f.v.: Knút Háberg, beiggi Petur, Elma Johansen og mamman, Hjørdis Háberg, versonurin, Ejler Jacobsen, og Erna Háberg Hansen, dóttir Petur*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*